VIÐMERKINGAR

# Maskinmeistaraútbúgvingin í vanda

YVIRLÝSING

*Maskinmeistarafelagið*

Líka síðani stovnanina hevði Maskinmeistaraskúlin vánaligar hølisumstøður og tí var tað eitt stórt framstig fyri skúlan, tá ið flutt varð í bygningin við Krákugjógv fyri nøkrum árum síðani og alt virksemi skúlans umsíðir var samlað undir einum taki. Hesin bygningur er síðani serliga tillagaður útbúgving av maskinmeistar-um, soleiðis at umstøðurnar hjá lærarum og næmingum hava verið rættiliga góðar. Fyri einum árum síðani komu so boðini um, at ástøðiliga undrivísingin á maskinmeistaraútbúgvingini skuldi flytast út á Føroya sjómansskúla meðan verkligi parturin framhaldandi skuldi fara fram undir Krákugjógv. Hetta var eitt sera álvarsligt mistak. Hølini á Føroya sjómansskúla vóru als ikki á sama støði, sum á skúlanum undir Krákugjógv. At hava ástøðiligu undirvísingina á einum stað og verkliga partin aðrastaðni er sera óarbeiðsligt og darvandi fyri undirvísingina sum so. Harafturat tykist sum maskinmeist-araútbúgvingin er nógv niðurprioriterað við tí úrsliti, at útbúgvingarstøðið helst lækkar. Sambært lógini skal eitt útbúgvingarráð við umboðum fyri viðkomandi partar setast til at viðgera útbugvingina, men hóast lógin er frá frá 24.04.2001, so er eingin kunngerð komin enn, hóast bæði Maskinmeistarafelagið og onnur fleiri ferðir hava spurt eftir hesum. Samanumtikið so tykist tað ikki sum nakar myndugleiki kennir sær ábyrgd av hesum útbúgvingarøki og Maskinmeistarafelagið metir, at støðan nú er so mikið álvarslig, at útbúgvingin er við at fara fyri bakka orsakað av kleyvarskapi og vanstýring frá myndugleikanna síðu. Vit heita tí á politisku skipanina um sum skjótast at áleggja Mentamálaráðnum at flyta maskinmeistaraútbúgvingina niðan aftur á maskinmeistaraskúlan undir Krákugjógv, soleiðis at undirvísingini kann byrja har aftur í august mánaða í ár. Harafturat má tryggjast, at umsitingin av hesum útbúgvingarøki verður fingin í eina trygga legu.

# Maskinmeistaraútbúgvingin er ikki í vanda

TÍÐINDASKRIV

Maskinmeistaraútbúgvingin er ikki í vanda og Mentamálaráðið og leiðslan á skúlanum kenna fulla ábyrgd av hesum útbúgvingarøki

Maskinmeistarafelagið vísir í tíðindaskrivi í gjár á, at felagið vil hava skúlan aftur undir Krákugjógv.

Felagið vísir m.a. á, at maskinmeistaraútbúgvingin er í vanda, og heitir á politisku skipanina um at áleggja Mentamálaráðnum at flyta útbúgvingina niðan aftur á Maskinmeistaraskúlan undir Krákugjógv, soleiðis at undirvísingin kann byrja har eftir summarfrítíðina. Mentamálaráðið vil við hesum vísa á, at Maskinmeistarafelagið ongantíð hevur vent sær til Mentamálaráðið viðvíkjandi hølisumstøðunum á skúlanum. Harumframt hevur Maskinmeistarafelagið ikki vent sær til Mentamálaráðið viðvíkjandi tí, at útbúgvingin skal vera í vanda. Mentamálaráðið undrast á arbeiðsháttin hjá Maskinmeistarafelagnum.

Leiðslan á skúlanum hevur tikið avgerð um, at øll ástøðilig undirvísing frameftir skal vera í Nóatúni, og hevur Mentamálaráðið fult álit á, at tað, sum er gjørt í hesum sambandi, er rætt, eisini sæð í ljósinum av, at arbeitt verður við, at hølisumstøður skulu fáast til vega soleiðis, at samlaða virksemið hjá skúlanum frameftir skal verða undir sama taki.

Mentamálaráðið veit, at nakrir fáir lærarar, sum undirvísa á maskinmeistar aútbúgvingini, eru ónøgdir við tað, sum er farið fram í sambandi við flytingina av ástøðiligu undirvísingini, men Mentamálaráðið hevur fult álit á tí, sum leiðslan hevur gjørt.

Viðvíkjandi útbúgvingarráðnum, so fer Mentamálaráðið ein av næstu døgunum at senda uppskot til fundarskipan fyri útbúgvingarráðið til hoyringar hjá avvarðandi pørtum, soleiðis at hesi viðurskifti koma í rættlag skjótast tilber.

At enda skal vísast á, at Maskinmeistaraútbúgvingin er altjóða góðkend grundað á dygdarmenningarskipan og eftirlitskrøv frá IMO (International Maritime Organisation).

# Tekniski skúli – fíggjast nú ella í 2027!

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK
løgtingskvinna



PM hevur um dagarnar havt tvey lesarabrøv um bygging av Tekniska skúla í Tórshavn. Yvirskriftin í seinnu greinini, er "Enn meira svik – Annita!"

Í greinunum báðum roynir Poul Michelsen at geva Tjóðveldisflokkinum skylduna av, at Tekniski skúli ongan veg er komin. Nú skal eg líka minna á, at Tjóðveldisflokkurin hevur sitið í andstøðu í 2½ ár, og at PM hevur sitið í samgongu hetta tíðarskeið. Og at tað tí neyvan kann verða Tjóðveldisflokkurin, sum hevur forhálað eini loysn av bygginingi.

Men trupulleikin hjá PM er, at eitt projekt lá klárt uppi í Mentamálaráðnum, tá ið Jógvan á Lakjuni tók við í febr 2004. Tingfólk hava fingið møguleika fyri at sæð tað projektið, og varð tað sera væl móttikið av bæði samgongu og andstøðu. Men so kom kynkur í sitandi samgonguna um skúlan, og valdi hon tí at punkterað ta ætlanina, sum Tjóðveldisflokkurin annars handaði Jógvani á Lakjuni. Men tað sum verri er, at meðan samgongan hevur valt hesa verkætlan frá, so hevur hon ikki arbeitt við nøkrum alternativið.

Skilji væl, at PM er skuffaður av síni egnu samgongu, men eri samstundis skuffað av, at hann velur at skjóta eftir Tjóðveldisflokkinum fyri hetta. Eri eisini skuffað av, at PM uttan orð ella eið góðtekur, at Jógvan á Lakjuni biðjur um 180 milliónir uttan at vita, hvør skúli skal byggjast fyri pengarnar.

Poul Michelsen góði, skilji væl tínar frustratiónir, nú samgongan ikki er samd um, og ikki veit, hvør skúli skal byggjast. Men tað er ófatiligt, at tú ikki hevur trýst Jógvan á Lakjuni at arbeitt við einum alternativið til okkara uppskot, tá ið tú góðtókst, at okkara uppskot varð vrakað. Ístaðin verður orkan brúkt til at skriva lesarabrøv móti Tjóðveldisflokkinum og undirritaðu.

Og so er tað fíggingarhátturin, sum skilir Tjóðveldisflokkin og samgonguna.

PM sigur, at tað einasta rætta er at fíggja skúlan yvir 20 ár, tí at ein lóg um yrkisskúlar loyvir hesum. Tað er rætt, at lógin loyvir stuðli til skúlabygging av yrkisskúlum. Men hon sigur onki um, at hesin stuðul skal verða rentu og avdráttarfrítt veðhaldslán yvir eitt óavmarkað tíðarskeið. Og hon sigur heldur onki um, at stuðulin ikki skal síggjast aftur á fíggjarlógini. Men hetta heldur PM kortini er í fínasta lagi. Og (mis)brúkar lógina sum umbering.

Um PM heldur hetta verða ein skilagóðan fíggingarhátt, so kann samgongan bara gera hetta lógligt til eina og hvørja verkætlan. Vit eru jú løggevandi valdið og hava tí amboðið til tað. Tað var eisini tað, sum samgongan ætlaði skuldi verða mannagongdin við Hovstunnilin, at gera hendan fíggingarháttin lógligan. Men hesum stríddust Tjóðveldisflokkurin ímóti við hjálp frá PM - og vit vunnu! Men nú er PM eftir øllum at døma hvokkin og orkar ikki at stíðast ímóti tilvildarligum samgonguavgerðum.

Tjóðveldisflokkurin mælti til, til atkvøðugreiðsluna í tinginum mikudagin, at tekniski skúli varð bygdur, og at hann varð fíggjaður yvir 5 ár. Soleiðis høvdu vit sæð virksemi av hesi bygging aftur á fíggjarlógini. Men hesum atkvøddi PM ímóti! Meðan Tjóðveldisflokkurin – eisini Tobbi og Finnur – atkvøddu fyri! Tjóðveldisflokkurin hinvegin atkvøddi so ímóti, at skúlin skuldi fíggjast yvir 20 ár, meðan PM atkvøddi fyri tí. Soleiðis atkvøddi alt tingið fyri at tekniski skúli skuldi byggjast í Havn, men ósemjan stóðst um fíggingarháttin.

So hvør er meira fyri, og hvør er meira ímóti, at nýggjur Tekniskur skúli skal byggjast í Havn, tað kann lesarin sjálvur meta um.

At PM í tveimum blaðgreinum verjir ein fíggingarhátt, sum vit síggja sum ræðumynd frá 80 árunum, kann bara verða tí, at hann er partur av eini samgongu, sum ikki ynskir ein sjálvberandi búskap. So hvør í svikar hvønn, kann lesarin og veljarin eisini meta um.

# Rock n'roll yviri við Strond



KONSERT

*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

Nú sólskin er, gerast fólk so glað og spontan. Hetta kann í øllum førum sigast um Mark Joensen.

Mark hevur avgjørt at skipa fyri eini stórari uttanduðra rockkonsert í Havn. Á konsertini luttaka fleiri av okkara allarfrægastu tónleikabólkum. Men tað besta av øllum er – konsertin er ókeypis!!

Mark Joensen sigur við Planet at hann fekk hugskotið av tí góða veðrinum.

"Tað er ikki oftari enn so, at tað er so gott veður, men tá ið sólin er so gávumild, so mugu vit eisini verða tað", sigur Mark Joensen.

Mark fór á www.kjak.fo og setti fram ein fyrispurning um tónleikarar vorðu við uppá eitt slíkt tiltak. "Og tað var beinanvegin ein super kulir stemmningur millum bólkarnar. Teir vildu beinanvegin luttaka, og tí fór eg alt fyri eitt at fyrireikað tiltakið. So setti eg meg í samband við mynduleikarnir.

Eg roknaði við at hetta fór at verða tungt, men kommunan, Kunningarstovan og Politistøðin vóru ófør at hjálpa. Tað skulu tey hava eina hjartan tøkk fyri", sigur Mark.

Bólkarnir ið luttaka eru: Dejavu, The Dreams, The Story Ends, Skunk og 3 colours. Fyrivarni má tó takast fyri skránna, tí at skoðbráð-ið er so stutt, men allir bólkarnir gera sítt besta at megan at samla troppanar til konsertina. Og kanska verður onkur bólkur afturat.

Konsertin byrjar kl. 15, og heldur áfram til kl. 22. Mark sigur, at har eru ymiskir hentleikar á økinum so sum w.c., men um fólk vilja hava eitthvørt til at leska sær við, má tað gerast aðrastaðni.

Konsertin er ókeypis. "Í dag hugsa vit bara um tónleik, ikki pengar", sigur Mark Joensen at enda.

# Nýggjur portalur

*Tíðindaskriv*

Í dag, týsdagin 9. mai, almannakunngjørdi Vikublaðið ein nýggjan tíðindaportal. Á heimasíðuni www.vikublad.fo ber nú til at fáa tey feskastu tíðindini, bæði úr Føroyum og úr útheiminum.

Vikublaðið hevur í eina tíð arbeitt við at seta tíðindaportalin á stovn, og nú er hann so veruleiki. Roynt verður at hava so mikið fjølbroytt tíðindi sum gjørligt, og ætlanin er, at okkurt skal verða bæði fyri yngra og eldra ættarliðið.

Ætlanin er somuleiðis at menna www.vikublad.fo so líðandi, og einki er at ivast í, at við tíðini koma eisini fleiri hentleikar á heimasíðuna.

Vikublaðið vónar, at Føroya fólk fer at taka væl ímóti nýggja tíðindaportalinum, og øll eru vælkomin at venda sær til Vikublaðið við hugskotum og góðum ráðum.